## Petur Elias Petersen:

# Oyggjaleikirnir til Føroya í 2021

**OYGGJALEIKIR** Forsetin í ÍSF hevur bjartar vónir um at fáa oyggjaleikirnar til Føroyar, men tað krevur vælvild frá politiska baklandinum og diplomatiskar snildir at fáa leikirnar hendan vegin.



*Petur Elias Petersen, forseti í ÍSF, vil fegin hava Oyggjaleikirnar aftur til Føroya*
Mynd: Álvur Haraldsen

Tróndur Arge



– Manglandi gistingarumstøðurnar kunnu skúlar og Norrøna loysa, men ein nýggjur golfvøllur er kortini ein treyt, sigur Petur Elias Petersen.

Í dag sært tú sjáldan eyðkendu hvítu t-shirtina við oyggjaleikabúðmerkinum og lundanum, Pidda, á bringuni. Oyggjaleikirnir hava ikki verið í Føroyum síðani 1989, og nú metir ÍSF forsetin, at tíðin er búgvin til, at vit gera eina roynd at fáa teir aftur til okkara .

– Oyggjaleikirnir eru eitt stórt tiltak og ein góður møguleiki hjá okkum at branda Føroyar. Til Oyggjaleikirnir í 2015 tapti Gotland tepurt í atkvøðugreiðsluni, og tí liggur í luftini, at Gotland fær Oyggjaleikirnar í 2017. Oyggin Menorka hevur bjóðað seg fram til 2019 og hevur fyrimunin av at vera ein miðalhavsoyggj, so hon tiltalar nógv. Okkara møguleiki liggur tí í at bjóða okkum fram til 2021, og spæla vit kortini rætt, so er góður møguleiki fyri, at vit hýsa leikunum í 2021, sigur Petur Elias Petersen.

Ítróttarligu umstøðurnar í Føroyum eru góðar, men á trimum økjum mugu myndugleikarnir vísa vælvild, um føroyska boðið upp á oyggjaleikirnar skal takast í álvara.

– Um vit skulu gera okkum nakra vón um at hava oyggjaleikirnir, so mugu vit hava ein golfvøll við 18 holum.

Fyri fleiri av luttakandi oyggjunum er ein golfvøllur avgerandi fyri, hvar oyggjaleikaatkvøðurnar enda. Eisini tennis hevur ein avgerandi leiklut, og har hava vit bara tann eina tennisvøllin í Gundadali. Tað triðja er ein skjótibreyt, men tað burdi ikki verið so trupult at fingið eina líknandi setta upp í eitt nú grótbrotinum á Glyvursnesi, heldur hann.

Ein onnur avbjóðing, ið Føroyar fáa til oyggjaleikirnar eru gistingarmøguleikarnar. Vit hava ikki nóg mikið av gistingarhúsum, men eisini her er ein møgulig loysn longu á veg.

– Ein møguleiki er at fáa eitt skip líknandi Norrønu at liggja við kai og hýsa teimum luttakandi. Um øll gistingarhús í Føroyum eru full um tað mundið, tá leikirnir eru, so kann Norrøna eins væl liggja við kaj og virka sum gistingarhús. Vit hava longu havt eitt innleiðandi prát við Smyril Line um hendan møguleikan, sigur Petur Elias Petersen.

– Ein annar møguleiki er, at vitjandi ítróttarfólkini kunnu halda til í fleiri av okkara fráliku skúlum. Tað hava vit sæð aðrastaðni, og so leingi tey ikki eru ov nógv um hvørja skúlastovu, so tykist hetta ikki vera ein trupulleiki, sigur Petur Elias Petersen víðari.

ÍSF forsetin leggur afturat, at tað er týdningarmikið, at eitt nú golfvøllurin er klárur í 2015, tí IGA nevndin leggur stóran dent á, at ítróttarligu umstøðurnar eru klárar í verki heldur enn á skrivaraborðinum.

Petur Elias Petersen varð valdur ÍSF-forseti í maimánaði í ár, men hevur í fleiri ár fingist við annað arbeiði í føroyska ítróttarheiminum. Hann hevur eisini eitt ynski um, at føroyski ítrótturin verður eins væl, um ikki betri, stuðlaður til teir komandu oyggjaleikirnar eins og teir undanfarnu .

– Tað er dýrt fyri sersambondini at luttaka á oyggjaleikunum, og tíverri minkaði ítróttarjáttanin til seinastu oyggjaleikirnir, men vónandi sær politiska baklandið, hvussu týdningarmiklir oyggjaleikirnir eru fyri føroyska ítróttarheimin, sigur Petur Elias.

Føroyar vunnu seinastu leikirnir, men hvørjar vónir hevur ÍSF forsetin til komandi leikirnar.

– Hesa ferð verður ongin fimleikur við, og har hava vit vunnu mangt heiðursmerkið. Eitt gull heiðursmerki í fótbólti ella flogbólti er sjálvandi eitt gott heiðursmerki, men tað telur bara fyri eitt heiðursmerki í samlaðu støðuni. Tí kann tað koma at síggjast aftur, at fimleikurin ikki er ein partur av komandu leikunum. Eitt mál kundi verið at enda millum fimm tey fremstu, sigur Petur Elias at enda.

Forsetin í ÍSF hevur givið greiðar ábendingar um, at Føroyar kunnu verða vertir fyri Oyggjaleikunum í 2021, nú er spurningurin bara, um politiskabaklandið er áhugað í at fylgja málinum upp og eitt nú byggja ein nýggjan golfvøll.

Nú eru yvir 20 ár síðan, at lundin Piddi gjørdi seg galdandi í føroyska ítróttarheiminum. Nú er tíð upp á at hann kemur í form aftur.

*trondur@sosialurin.fo*

# Flogvanlukkur kravdu 831 mannalív í fjør

**FLOGFERÐSLA** Í fjør vóru 29 vanlukkur við sivilum ferðamannaflogførum, og tilsamans kravdu vanlukkurnar 831 mannalív. Tað skrivar Aviation Safety Network

Árni Joensen

Hagtølini hjá Aviation Safety Network vísa, at tað vóru heldur færri flogvanlukkur í fjør enn meðaltalið tey seinastu 10 árini, men harafturímóti kravdu tær fleiri mannalív. Tað seinasta 10 ára skeiðið hava tað verið 29 vanlukkur við sivilum ferðamannaflogførum í meðal, og í meðal hava tær kravt 810 mannalív árliga.

Tann ringasta flogvanlukkan í 2010 var á Mangalore Bajpe-flogvøllinum í India tann 22. mai, tá eitt Boeing 737-800 hjá felagnum Air India fórst, júst sum tað skuldi seta seg. 158 fólk lótu lív.

Í fleiri ár hevur Afrika staðið á svartalista sum tann vandamesti heimsparturin at flúgva í, tí myndugleikarnir í fleiri londum har hava lagt ov lítlan dent á flogtrygdina. Aviation Safety Network sigur, at hóast 2010 royndist munandi betur í Afrika enn undanfarin ár, vóru 17 vanlukkur við sivilum ferðamannaflogførum í afrikonskum loftrúmi í fjør. Við øðrum orðum vóru næstan 60 prosent av vanlukkunum í Afrika, hóast heimsparturin bara hevur trý prosent av teirri sivilu flogferðsluni, sigur ASN.

**Lending vandamest**

Tær flestu vanlukkurnar henda, tá flogfør eru á veg niður ímóti flogvøllinum, og tá tey seta seg. Av teimum 29 vanlukkunum í fjør vóru fimm í sambandi við fráferð, 10 hendu á sjálvari ferðini, og hinar 14 hendu í sambandi við lending, ella tá flogfør fyrireikaðu seg til at seta seg.



*Tann ringasta flogvanlukkan í 2010 var í India tann 22. mai. Hon kravdi 158 mannalív*
Mynd: AP

Seks av vanlukkunum vóru við flogførum hjá flogfeløgum, sum standa á svartalista hjá ES orsakað av vantandi trygd.

Aviation Safety Network sigur, at 2010 var millum seks tey tryggastu flogárini síðani seinna heimsbardaga.

*arni@sosialurin.fo*